# SAMVERUREGLUR

**!** *Á tiltøkunum hjá Sjómaq skulu øll kenna seg trygg, vird og vælkomin í felagsskapin, og øll skulu kunna luttaka í skránni á jøvnum føti. Fyri at tryggja hetta hava vit gjørt nakrar samverureglur, sum vit vænta, at allir luttakarar fylgja.*

## Far við øllum við virðing

- Far við øðrum menniskjum á tann hátt, sum tú sjálv/ur vilt, at onnur skulu fara við tær.
- Vit góðtaka undir ongum umstøðum happing, rasismu, sexismu, homofobi o.s.fr.

## Virð mørkini hjá øðrum

- Vit eru øll ymisk og hava ymisk mørk. Ert tú í iva um mørkini hjá einum øðrum, skalt tú spyrja.
- Vit góðtaka undir ongum umstøðum kynsligan ágang av nøkrum slag.

## Ver fevnandi og fá vinir

- Sært tú onkran sita einsamallan? Spyr, um viðkomandi hevur hug at práta.
- Minst til at tosa týðiligt og sakta, so øll skilja og kunnu vera við í samrøðuni. Summir av luttakarunum hava ikki danskt sum móðurmál. Gev øðrum rúm og tíð at sleppa framat og tosa liðugt

## Luttak og møt rættstundis

- Luttak aktivt og vís hinum luttakarunum virðing við at møta rættstundis allan túrin.

## Boða fyriskiparunum frá

- Av trygdarávum skulu vit hava boð, um tú fert av hotellinum ella frá aktivitetunum, meðan kravda skráin fer fram. Fá fatur á einum av okkum og sig frá, áðrenn tú fert.

## Seminarið er rúsdrekkafrítt

- Vit koma úr ymiskum mentanum við ymiskum lógum og sjónarmiðum um rúsdrekka og rúsdrekkamentan. Á seminarinum fara vit samstundis at arbeiða við evnum, sum kunnu vera viðkvom hjá summum. Fyri at øll skulu kenna seg vælkomin og trygg, hava vit tí valt, at tiltakið er rúsdrekkafrítt.
- Tað er ikki loyvt at drekka rúsdrekka, hvørki á seminarinum (heldur ikki um kvøldið) ella á ferðunum millum Danmark og Grønland.

### Tú kanst altíð venda tær til okkara

Verður tú sjúk/ur, hevur onkur farið um mark títt, ella er okkurt annað, sum nívir teg? Boða okkum frá, so kunnu vit hjálpa tær.

**Vit gleða okkum at hitta teg**

- Jonas, Julie, Danna, Eylem og Sofie